# Dyrnar út í heim!




## Hetta fært tú við í keypinum

**2 orðabøkur**, innbundnar í snøggum húsa

**Fløgu** við trimum stórum orðabókum: føroyskt-enskt, enskt-føroyskt og danskt-føroyskt.
Tú sleppur at royna allar tríggjar orðabøkurnar á fløgu í tveir mánaðir ókeypis (PC/Win)*

**Internet orðabókahald Sprotans** ókeypis í ein mánað.
Tú sleppur ókeypis at brúka allar orðabøkurnar á www.sprotin.fo í ein mánað (PC/Win og Mac)

**Við internethaldinum** fært tú eisini størstu donsku-føroysku orðabókina, sum er til í heiminum, púra ókeypis.

**Tú sleppur** at nýta internetorðabøkurnar á www.sprotin.fo so skjótt, tú hevur teknað teg til at keypa orðabókapakkan.

**Tú kanst** rinda alt gjaldið í einum ella í 7 gjøldum á 200 kr.

Fari við hesum at seta meg fyri ____ sett av nýggju føroyskt-enskt og enskt-føroyskt orðabókum Sprotans. Gjaldið, **kr. 1.400** fyri settið, fevnir um báðar bøkurnar, fløgu og internethald sambært útgreining omanfyri.

Navn og eftirnavn: ....................

Gøtunavn og nr.: ....................

Bygd/býur: .................... Postnummar: ....................

Vinaliga rindið Sprotanum hesa upphædd kr. ____________ av kontu mínari

☐ Eg vil gjalda alla upphæddina í einum.

☐ Eg vil fegin rinda upphæddina í 7 mánaðargjøldum við fastari flyting.

Undirskrift: ....................

Telefon: ....................

Teldupostur: .................... Dagfesting: ....................

## Størsta føroyska orðabókin nakrantíð

Nýggju **føroyskt-enskt** og **enskt-føroyskt** orðabøkurnar frá Sprotanum telja til samans einar 4000 blaðsíður. Orðabøkurnar verða seldar sum sett og kosta 1.400 kr. um keypt verður beinleiðis frá forlagnum nú. Tær kosta 1.900 kr í bókabúðunum.

### Bílegging og gjaldsháttur

Send henda lepan útfyltan í brævbjálva til **Sprotan, Hornavegi 12, 350 Vestmanna,** ella faxa hann til 424436, so fært tú bøkurnar við postinum.

*) Við orðabókunum á tíni egnu teldu fært tú allar fyrimunir, ið ein framkomin leitiskipan hevur, og kortini nýtist tær ikki at vera knýttur í netið, meðan tú arbeiðir.

SPROTIN

GRAMAR ☎ 609000



almannastovan
almannastovan@almannastovan.fo
www.almannastovan.fo

*Umsóknarfreist er týsdagin 11. mars 2008.*

*Vinarliga merkið brævbjálvan: "Umsókn Arbeiðsmarknaðardeildin".*

## Hevur tú hug at vera við til at FÁA FÓLK Í ARBEIÐI



**Arbeiðsmarknaðardeildin á Almannastovuni søkir ráðgevar. Talan er bæði um fast starv og avloysara størv, møguleiki er fyri niðursettari tíð.**

**Um deildina**
Arbeiðsmarknaðardeildin hevur til uppgávu at tæna borgarum, sum av sosialum ella heilsuligum orsøkum hava skerdan arbeiðsførleika, og tí mugu hava stuðul fyri at blíva arbeiðsliga og fíggjarliga sjálvbjargin. Á deildini starvast í løtuni 10 sosial- og arbeiðsmarknaðarráðgevar, umframt ein skrivari og ein deildarleiðara. Deildin er landsumfatandi við sæti í Tórshavn.

**Arbeiðsmarknaðaruppgávur**
Arbeiðsmarknaðaruppgávur verða fyrst og fremst at menna uppsøkjandi arbeiði á arbeiðsmarknaðinum, fáa avtalur í lag, gera sáttmálar í ítøkiligum málum og uppbyggja ein grunn av ítøkiligum arbeiðsmøguleikum.

**Sosialfakliga uppgáva**
Arbeiðið fevnir um sosiala ráðgeving og vegleiðing, vegleiðing um verkligar og útbúgvingarligar spurningar, tilrættalegging fyri umsøkjarar av tiltøkum á arbeiðsmarknaðinum og í sambandi við útbúgving, uppfylging av fyriskipanum, viðgerð og støðutakan til mál um fíggjarligar veitingar, lýsing og tilráðing í málum um fyritíðarpensjón, umframt aðrar uppgávur ið eru álagdar deildini.

**Førleikakrøv**
Ert tú sosialráðgevi, námsfrøðingur, ergoterapeutur, samfelagsfrøðingur, ella hevur aðra sosiala ella samfelagsliga útbúgving, og hevur tú hug til sosialt arbeiði og vilt verða við til at gera mun, so er tað tær vit vilja hava fatur á. Royndir í líknandi arbeiði kunnu vera ein fyrimunur.

**Lønar- og setanarviðurskifti**
Størvini verða sett og lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið í lønarbólki 6.

**Nærri upplýsingar**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Hallur Thomsen, deildarleiðara, á telefon 35 35 70.

**Umsókn við avriti av prógvum, CV, v.m. skulu sendast til**
Almannastovuna Smyrilsveg 20, Postboks 3096, 110 Tórshavn.

KREA



# Verkfrøðingur/tøkningur

Vit sóknast eftir verkfrøðingi, byggifrøðingi ella starvsfólki við líknandi útbúgving ella royndum

Tú kemur at starvast mitt í býnum saman við eldhugaðum og dugnaligum starvsfeløgum, ið miðvíst hugsa um umhvørvið. Okkara arbeiðsuppgávur eru fjølbroyttar og avbjóðandi og fevna um:

- Umhvørvisráðgeving
- Grøna orkuveiting
- HVS-verkætlan
- Ventilatiónsskipan
- Vatnveiting
- Kloakkskipan

Vit vænta, at tú dugir væl at arbeiða við vanligum Microsoft forritum og AutoCAD el. likn. Harumframt skal tú duga at arbeiða sjálvstøðugt við fleiri uppgávum samstundis og hava góð samstarvsevni. Royndir innan omanfyrinevndu arbeiðsøki er ein fyrimunur, men ikki ein treyt.

Løn og setanartreytir verður avtalað í samsvar við útbúgving og royndir.

Starvið verður sett sum skjótast, men vit bíða fegin eftir rætta fólkinum ella røttu fólkunum.

Send okkum eina umsókn við C.V. og prógvum til: Martin E. Leo Sp/f, Ráðgevandi verkfrøðingar, Tórsgøta 24, 100 Tórshavn. Ella við telduposti til mel@mel.fo

Martin E. Leo Sp/f
Ráðgevandi verkfrøðingar
Tórsgøta 24 · 100 Tórshavn
Tel 66 14 88 · Fax 31 54 88 · mel@mel.fo